## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, ið vístu samkenslu,
tá kæra mamma, vermamma, omma
og langomma okkara

**Helga Sylvia Jacobsen**
Kaldbak

doyði og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og alla ta hjálp,
ið varð veitt okkum. Tøkk til øll, ið fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

**Solveig og Anna við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt
sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, vermamma,
omma og langomma okkara

**Anna Kristensa Olsen**
**Skála**

andaðist og varð jarðað.

Vit takka presti, sangarum, berarum og kirkju-
tænarum, starvsfólki á Landssjúkrahúsinum,
kommunulæknum og heimasjúkrasystrum,
sum vóru um hana.
Vit takka fyri blómur, kransar og gávur til
Eldrafelagið á Skála. Vit takka tykkum mongu,
sum hjálptu til við ervinum og øllum tykkum,
sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jógvan, Kristbjørg, Jóngerð, Eivind, Kartin og Eilif**

## †

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara kæra mamma, vermamma, omma
og langomma

**Sanna Vang**
**Glyvrar**

andaðist hósdagin 23. oktober, 87 ára gomul.

Kistan fer úr Kapellinum á Landssjúkrahúsinum
leygardagin kl. 16.
Jarðarferðin verður úr Glyvra Kirkju
sunnudagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*
**Martin, Lena og Sunnvard**

Tey, ið vilja minnast Sannu, kunnu lata eina peningagávu
til Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum.




Útbúgv teg til
sjúkrarøktarfrøðing

Útbúgvingin til sjúkrarøktarfrøðing – Bachelor í sjúkrarøktarfrøði – byrjar 2. februar 2004.

Vilt tú hava eina útbúgving har tú:
- fært stórar avbjóðingar, nógvar valmøguleikar og brúk fyri tínum persónligu eginleikum og hollari ástøðiligari vitan.
- hevur nógvar starvsmøguleikar innan alla heilsutænastu og møguleikar fyri at arbeiða uttanlands, bæði hjá humaniterum stovnum og øðrum ótraditionellum støðum.

Treytirnar fyri upptøku eru:
- at umsøkjarin hevur lokið students, HF, HH, HT, HIF-prógv ella líknandi prógv.
- umsøkjari, ið hevur aðrar royndir og/ella útbúgvingar, men ikki fult út lýkur krøvini kann fáa atgongd, um so er at hann hevur í minsta lagi 9 mánaða arbeiðsroyndir ella aðrar viðkomandi royndir og prógv á miðnámsskúlastøði í fakunum: Føroyskt, Danskt B ella annað norðurlendskt mál á sama støði, Enskt B Evnafrøði B ella Lívfrøði B, Samfelagsfrøði C ella Sálarfrøði C.

Umsóknarbløð og nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, Eirargarður 14 B, tel. 31 59 50.

Umsóknarfreist fríggjadagin 21. november 2003.

Sjúkrarøktarfrøðiskúli
Føroya

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya, Eirargarður 14B, FO-100 Tórshavn
tel: 31 59 50, faks: 31 39 26, teldupostur: srfs@skulin.fo, www.srfs.fo



J. Broncksgøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

VETRARTILBOÐ



1 vika í Danland
1 vika í Danland-íbúð í Blokhus, Hirtshals ella Ebeltoft
Tilboðið er galdandi frá 18.9. - 2003 til 27.3. - 2004
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
úr 5.995,-

1 vika á Pers Hotel
Frítíðardepilin Pers Hotel í Gol í 1 viku
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
5.000,-

Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi í Easterhoull í Hetlandi
ferð við uppihaldi fyri 2 vaksin og 2 børn við bili fram og aftur
4.500,-





2 FYRI 1
Ferðist 2 og gjaldið fyri 1
fram og aftur í innv. 2-koyggju-kamari við wc/bað íroknað bil:
Til Danmarkar: 2.990,-
Til Noregs: 2.380,-
Til Hetlands: 1.790,-

Hetland-Cruise við hotelli
Hósdag - Mánadag: 1.500,-
Mánadag - hósdag: 1.000,-

Mini-Cruise úr 600,-
Til Danmarkar ella Noregs



SMYRIL LINE




# NCC hevur lægsta tilboðið

**Føroya Konsortium við NCC, Byggitek og J&K Petersen hevur lægsta tilboðið á 248 mio. um undirsjóvartunnil undir Leirvíksfjørð. Við teimum royndum felagið hevur við undirsjóvartunlum í Føroyum, tykist rættiliga sannlíkt, at NCC eisini fær tunnilsarbeiðið undir Leirvíksfjørð.**



*Bjarni Djurholm var sera fegin um tilboðini. – Tað sær rættiliga spennandi út. Nú skulu endaligu samráðingarnar fáast í hús, og líkt er til at farast kann undir arbeiðið um ársskiftið, so tíðarætlanin heldur, segði ein fegin Bjarni Djurholm*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

NORÐOYATUNNILIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Tað var stórur spenningur undan tíðindafundinum hjá P/F Norðoyatunlinum seinnapartin hósdagin á Hotel Hafnia. Tilboðini um tunnilsarbeiðið undir Leirvíksfjørð skuldu kunngerast.

Trý tilboð vóru komin inn í alt, og lægsta tilboðið var áljóðandi 248 mio krónur. Hetta tilboð átti Føroya Konsortinum bólkurin við NCC, Byggitek og J&K Petersen. Sama felag gjørdi Vágatunnilin, og hóast eingin endalig avgerð fyriliggur, so merktist á fólki á tíðindafundinum, at talan nærmast er um ein avgreiðsluspurning, at NCC eisini skal gera undirsjóvartunnilin undir Leirvíksfjørð.

MT Højgaard saman við Kruse&Smith átti næst lægsta tilboðið á 267 mio. krónur. Phil Group hevði hægsta tilboð á 339 mio. krónur, so munurin millum hægsta og lægsta tilboð var góðar 90 millíonir.

### Lægri enn væntað

Samlaða ætlanin er mett at kosta 335 mio krónur. Landskassin fíggjar 225 mio, meðan tær írestandi 110 mio. verða fíggjaðar við láni. Vegagerð, El- arbeiðið og sjálv boringin er umfatað í samlaða kostnaðinum. Borðingin varð mett at kosta góðar 270 mio. krónur. Tvey tilboð lógu undir metingini, og tað fegnaðist landsstýrismaður, Bjarni Djurholm, um.

– Tað sær rættiliga spennandi út. Lægsta tilboðið er væl lægri enn metingar, so tað sær skilagott út. Nú skulu endaligu samráðingarnar fáast í hús, og líkt er til at farast kann undir arbeiðið um ársskiftið, so tíðarætlanin heldur, segði ein fegin Bjarni Djurholm

### Skeivt stað

Norðlýsið róð í gjár framundir, at tað var rættiliga løgið, at tíðindafundurin um tilboðini til tunnilsarbeiðið skuldu vera í Havn. Norðoyatunnilin er ein stór hending fyri norðoyingar og eysturoyingar, og tí átti at verið upplagt, at tíðindafundurin varð hildin í Klaksvík ella Leirvík.

Klaksvíkingar kunnu eftir øllum at døma ugga seg við, at næsti tíðindafundur, tá endaligur sáttmáli verður undirskrivaður, verður sambært formanninum í P/F Norðoyatunlinum Bergur í Garði, norðanfyri, sum hann málbar seg.



*Nevndin fyri P/F Norðoyatunnilin sær spent út, nú tilboðini um arbeiðið undir leirvíksfjørð skal kunngerast. NCC hevði lægsta tilboðið á 248 mio. krónur, og hetta er væl minni enn metingarnar frammanundan*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Formaðurin í P/F Norðoyatunlinum, Bergur í Garði, fegnast um, at tilboðini liggja undir metingunum. Endaligur sáttmáli verður undirskrivaðir 11 november, og tunnilsarbeiðið fer vónandi av bakkastokki 1.desember í ár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Væl nøgdur

**Formaðurin í P/F Norðoyatunlinum, Bergur í Garði, fegnast um, at tilboðini liggja undir metingunum. Hann vónar og væntar, at farast kann undir tunnilsarbeiðið um Leirvíksfjørð 1.desember í ár.**

NORÐOYATUNNILIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*

Vit hittu ein fegnan formann fyri P/F Norðoyatunnilin eftir tíðindafundin í hósdagin.

– Vit eru sera væl nøgdir við tilboðini, og tað er gleðiligt, at tey liggja undir metingunum. Eg eri fegin um, at kapping hevur verið um arbeiðið, og tað sæst eisini aftur á tilboðunum og stóra áhuganum. Nú skulu vit gera okkara heimaarbeiði í leiðsluni og ráðgevingini, áðrenn endaligur sáttmáli verður undirskrivaður, segði Bergur í Garði eftir tíðindafundin

Hann segði seg vænta, at endaligur sáttmáli verður undirskrivaður 11. november við eitt av teimum trimum feløgunum. Spurdur, um tað ikki er upplagt at geva NCC tunnilsarbeiðið, nú felagið hevur lægsta tilboðið og royndir frá Vágatunlinum, svaraði Bergur í Garði, at nú skulu tilboðini nærlesast, men at útgangspunktið verður sjálvsagt tikið eftir lægsta tilboðnum.

Formaðurin í P/F Norðoyatunnilin er ótolin at fara undir arbeiðið, og hann vónar og væntar at farast kann undir tunnilsarbeiðið um 1. desember í ár.





GSM FRÍTÍÐ

| | Teletíð | GSM FRÍTÍÐ |
|---|---|---|
| Stovnan | 300,-* | 0,- |
| Mánaðargjald | 0,- | 40,- |
| Samrøður - dag | 3 kr/min | 2,25 kr/min |
| Samrøður - kvøld | 2 kr/min | 0,75 kr/min |
| SMS-boð | 0,75 | 0,50 |

*íroknað kr. 100,- talutíð

GSM frítíð kann bert nýtast í Føroyum. Kvøld er frá kl. 18.00 - 08.00. Fyrivarni verður tikið móti prentvillum.
+298 303030 www.tele.fo

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum